Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Klaksvíkar Býráð

Dagfesting: 06.02.2020 kl. 17:30
Málnr.: 16/01208
Nevndarlimir: Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen, Gunvá við Keldu, Atli S. Justinussen, Beinir Johannesen, Steinbjørn O. Jacobsen, Kristian Eli Zachariasen, Herfrí J. Sørensen, Óli M. Lassen, Tummas J. Lervig og Beinta Klakstein.

Málsyvirlit		
Til viðgerðar		
1/20	19/01422-1	Uppskot til byggisamtyktarbroyting – Økispartur C12 til A18
2/20	20/00048-4	Makaskifti og broyting í byggisamtyktaráseting
3/20	20/00058-1	Broyting av byggisamtykt - nýtt D-øki millum Hjalla/undir Grashjalla

Til viðgerðar

1/20
19/01422-1 Uppskot til byggisamtyktarbroyting – Økispartur C12 til A18

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	20.01.2020	1/20
2 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	21.01.2020	2/20
3 Klaksvíkar Býráð	06.02.2020	1/20

Frágreiðing um málið:
Óli Lassen, býráðslimur, skjýtur upp at broyta C12 (Almennir bygningar v.m) til A18 (Blandað íbúðar- og vinnuendamál).

Galdandi byggisamtykt: C12 – Almennt endamál



Broytingaruppskot: A18 - Blandað íbúðar- og vinnuendamál

<u>Lógargrundarlag:</u>

Almenna byggisamtyktin fyri Klaksvíkar kommunu

C12:

Galdandi byggisamtykt loyvir almennir bygningar v.m,; lokalan miðdepil, so sum minni skúlar, dagstovnar og onnur almenn tænasta umframt handil.

- Grundøkjavídd á minst 1000 m^2
- Byggiprosent á 40%
- Í mesta lagi 3 bygningshæddir
- Mest loyvda bygningshædd í mun til miðaljørðildi 8,5 m
- 1 p-pláss pr. 40 m^2, annars sambært meting frá byggivaldinum, alt eftir hvat slag av virksemi talan er um.

A18:

Galdandi byggisamtykt loyvir sethúsa- og samanbygd lág bygging.
Vinnubygningar til smáídnað, skrivstovu, stovnar-, handils- og tænastuvirksemi, í tann mun byggingin og nýtslan ikki lýtir dámin av bústaðaøki.

- Grundøkjavídd á minst 300 m^2 fyri sethús og 200 m^2 fyri samanbygd hús og íbúðir.
- Byggiprosent á 35%
- Í mesta lagi 3 bygningshæddir
- Mest loyvda bygningshædd í mun til miðaljørðildi;
    - 5 m til yvirgrind og 8,5 m til mønu
    - niðanfyri veg skal tó onki punkt á húsinum vera hægri enn 5,30 metrar omanfyri lidna veghædd. - Stovugólvið má í mesta lagi liggja 30 cm omanfyri lidna veghædd
- 2 p-pláss pr. grundøki. Bilhús verður roknað sum eitt p-pláss. Á hvørjum grundøki skal kunna ávísast pláss til bilhús

<u>Fíggjarligar avleiðingar:</u>

-

<u>Tilmæli:</u>

Málið verður latið nevndini til viðgerðar og støðutakan, um fyrisitingin framhaldandi skal arbeiða við broytingaruppskotinum.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 20. januar 2020:
Nevndin tekur undir við, at fyrisitingin framhaldandi arbeiðir víðari við broytingaruppskotinum.

Trivnaðarnevndin Børn og Ung 21. januar 2020:
Nevndin tekur undir við, at fyrisitingin arbeiðir víðari við broytingaruppskotinum, treytað av, at ætlaða dagstovnabyggingin á økinum ikki verður darvað.

Klaksvíkar Býráð 6. februar 2020:
Tilmælini frá UBN 20. jan. Og B&U 21. jan. 2020 einmælt samtykt.

2/20
20/00048-4 Makaskifti og broyting í byggisamtyktaráseting

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	20.01.2020	6/20
2 Tekniska Nevnd	22.01.2020	4/20
3 Fíggjarnevndin	04.02.2020	6/20
5 Norðoyrarnevndin	05.02.2020	3/20
4 Klaksvíkar Býráð	06.02.2020	2/20

Frágreiðing um málið:
Í samband við ætlanirnar hjá Sp/f Norðhús við bygging av íbúðum á Norðoyri var tann 10. januar 2020 fundur við Hjalta Josephsen, har m.a. varð kunnað um galdandi ásetingar fyri aktuella økispartin í byggisamtyktini.
Umframt at halda fram við byrjaðu byggingini norðanfyri verandi íbúðabygging, er ætlanin at byggja ein tilsvarandi bygning við 6 sjálvstøðugum íbúðum niðriundir (á matr.nr. 25s).

Fyri at ætlanin kann rúmast á økinum, verður neyðugt við meirøki omaneftir og suðureftir (sí kort niðanfyri)



<u>Lógargrundarlag:</u>
Býarskipanarlógin
Matrikullógin

<u>Fíggjarligar avleiðingar:</u>
Inntøka 245.520,- (matr.nr. 25p og 25t standa á kommunala sølulistanum fyri ávikavist kr. 136.080 og 109.440)

<u>Tilmæli:</u>
Tekniska Fyrisiting mælir til at broyta ásetingina um minstu grundøkjavídd í Almennu Byggisamtyktini galdandi fyri økispart A1 á Norðoyri, soleiðis at:

> verandi áseting "*300 m² fyri vanlig sethús og 200 m² fyri samanbygd hús*"
> verður broytt til "*300 m² fyri vanlig sethús og 150 m² fyri samanbygd hús og íbúðir*",

og at Tekniska Fyrisiting fær heimild til at samráðast við umsøkjaran um makaskifti sambært kortinum omanfyri.

<u>Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 20. januar 2020:</u>
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 14-01-2020.

<u>Tekniska Nevnd 22. januar 2020:</u>
Nevndin tekur undir við UBN 20-01-2020.

<u>Fíggjarnevndin 4. februar 2020:</u>
Nevndin tekur undir við UBN 20-01-2020 og TN 22-01-2020.

Norðoyrarnevndin 5. februar 2020:
Nevndin tekur undir við UBN 20-01-2020, TN 22-01-2020 og FíN 04-02-2020.

Klaksvíkar Býráð 6. februar 2020:
Tilmælið frá Norðoyrarnevndini 5. feb. 2020 einmælt samtykt.

3/20
20/00058-1 Broyting av byggisamtykt - nýtt D-øki millum Hjalla/undir Grashjalla

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Ferðslunevndin	22.01.2020	K-2/20
2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	20.01.2020	9/20
3 Tekniska Nevnd	22.01.2020	8/20
4 Klaksvíkar Býráð	06.02.2020	3/20

Frágreiðing um málið:
Skotið verður upp at leggja part av A18 um til D-øki, ið er fríøki, og fáa skipað parkeringsviðurskiftini í økinum sum liður í at varðveita náttúru- og siðsøgulig virðir í landslagnum.

Býarskipanarliga er hetta í tráð við onnur D-økir í býnum. Til dømis grøni geirin fram við Ravnagili D18 og framvið Vágsá D39, sí skjal *Klaksvík – Økispartar 14.01.20*.

Um hugt verður eftir býlinginum millum Hjalla, so er einki D-øki uttan grøni geirin D22. Sæð býarskipanarliga er hetta harmiligt, at nærum einki øki er lagt út til tess.

At leggja ein grønan geira fram við ánni, hevði hóskað økinum sera væl býarskipanarliga sæð.
Tí ein grønur geiri í hesum umráði fer at virka sum bindiliður og verður við til at tryggja eitt sjónligt samband millum vegirnar og býlingarnar. Samstundis sum geirin virkar sum bindiliður, so er hann eisini við at til skapa eitt frírúm í einum bygdum øki.
Ein annar fyrimunur við einum grønum geira er, at hann er við til at styrkja tað lívfrøðiliga fjølbroytni í einum bygdum øki, eitt nú smáfuglar og kykt. Sí skjal *Uppskot til nýtt D-øki m. Hjalla, u. Grashjalla.*

Somuleiðis er upplagt at gera umstøður til eina gøtu gjøgnum geiran. Hetta hevði stytt munandi um teinin millum Hjalla og restina av býnum og eggjað borgarum at nýta gøtuna, sum kann birta undir góða fólkaheilsu og frítíðarlív.

Verður hugt eftir parkerings- og ognarviðurskiftunum, so eigur kommunan øll jarðarstykkir, ið geirin umfatar. Somuleiðis eigur kommunan grundøkið á matr.nr. 1006ap, tí verður lagt upp til at knýta matr.nr.1006ap upp í grøna geiran og nýta part av grundøkinum til at tryggja og skipa betri parkeringsviðurskiftir í økinum.

Lógargrundarlag:
Almenna byggisamtyktin fyri Klaksvíkar kommunu
A18:
Galdandi byggisamtykt loyvir sethúsa- og samanbygd lág bygging.
Vinnubygningar til smáídnað, skrivstovu, stovnar-, handils- og tænastuvirksemi, í tann mun byggingin og nýtslan ikki lýtir dámin av bústaðaøki.

- Grundøkjavídd á minst 300 m^2 fyri sethús og 200 m^2 fyri samanbygd hús og íbúðir
- Byggiprosent á 35%
- Í mesta lagi 3 bygningshæddir
- Mest loyvda bygningshædd í mun til miðaljørðildi;
    - 5 m til yvirgrind og 8,5 m til mønu
    - niðanfyri veg skal tó onki punkt á húsinum vera hægri enn 5,30 metrar omanfyri lidna veghædd. - Stovugólvið má í mesta lagi liggja 30 cm omanfyri lidna veghædd
- 2 p-pláss pr. grundøki. Bilhús verður roknað sum eitt p-pláss. Á hvørjum grundøki skal kunna ávísast pláss til bilhús

Fíggjarligar avleiðingar:
Grundøki matr.nr. 1006ap verður tikið av grundstykkjalistanum, tískil verður ongin søla. Grundøkið er mett til kr. 186.960,-.

Skjøl:
Journal nr.: 20/00058-2 - *Uppskot til nýtt D-øki m. Hjalla, u. Grashjalla*
Journal nr.: 20/00058-2 - *Klaksvík – Økispartar 14.01.20*

Tilmæli:
Málið verður hervið latið nevndini til viðgerðar og støðutakan, um fyrisitingin framhaldandi skal arbeiða við broytingarsuppskotinum.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 20. januar 2020:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 13-01-2020.

Ferðslunevndin 22. januar 2020:
Málið verið til kunningar.

Tekniska Nevnd 22. januar 2020:
Nevndin tekur undir við UBN 20-01-2020.

Klaksvíkar Býráð 06. februar 2020:
Tilmælið frá TN 22. jan. 2020 einmælt samtykt.